**Endurlýsing:**

# Kom og ver við at fyriskipa vælferðina í Føroyum

**Fulltrúastørv á Fíggjardeildini eru leys at søkja í Almanna- og heilsumálaráðnum við setan skjótast til ber, 1 fast starv, 1 farloyvisstarv fram til 1. mars 2009.**



Sum fulltrúi á fíggjardeildini, kemur tú serliga at arbeiða við hagtalsgrundarlagnum og gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum innan almanna- og heilsuøkið sum heild. At luttaka í tvørgangandi arbeiðsuppgávum innan økið, og vera við til at hava eftirlit við útreiðslunum. Harumframt at ráðgeva stovnunum undir økinum um fíggjarstýring teirra.

**Førleikakrøv**
Viðkomandi búskaparfrøðilig ella samfelagsfrøðilig útbúgving frá hægri lærustovni, góðan teldukunnleika, umframt royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum og hagtølum.

**Felags fyri størvini**
Tey eru áhugaverd og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við hini starvsfólkini í ráðnum. Størvini eru sjálvstøðug, og góðir møguleikar eru fyri førleikamenning.

Starvsroyndir frá miðfyrisitingini er ein fyrimunur. Harumframt vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar- og setanartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

**Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til**
Almanna- og heilsumálaráðið,
Eirargarður 2,
FO-100, Tórshavn.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. mars 2008, kl. 12:00.

**Nærri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, á tel. 30 40 50, ella teldupost: ahr@ahr.fo.

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

*Vit draga eina línu - Vit seta skynsemi í hásæti - Vit vilja vita - Vit bróta slóð*

KREA

**ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo

# Sjúkrarøktarstjóri

**Starvið sum sjúkrarøktarstjóri á Landssjúkrahúsinum verður við hesum lýst leyst til setan sum skjótast ella eftir nærri avtalu.**



Sjúkrarøktarstjórin er partur av sjúkrahúsleiðsluni saman við sjúkrahússtjóranum og læknastjóranum.

Næsti fyrisetti er sjúkrahússtjórin.

Ábyrgd og heimildir hjá sjúkrahúsleiðsluni:
- Sjúkrahúsleiðslan hevur í felag yvirskipaðu leiðsluna av Landssjúkrahúsinum. Í hesum liggur: visiónir, mál og menning, sjúklingaviðgerð, diagnostikkur og røkt, gransking, langtíðar fysisk og fíggjarlig planlegging, stovnsmenning og leiðslumenning.
- Sjúkrahúsleiðslan skal virka og uppfatast sum ein heild við sjúkrahússtjóranum sum tann, ið hevur endaligu ábyrgdina yvirfyri Almanna- og heilsumálaráðnum.

Serligt ábyrgdarøki hjá sjúkrarøktarstjóranum:
- Ábyrgd av yvirskipaðu samskipanini á røktarfakliga økinum.
- Veita ráðgeving í røktarfakligum spurningum til Almanna- og heilsumálaráðið.

Ábyrdarøki og arbeiðsuppgávur eru neyvari greinaðar í starvslýsing, sum er til taks.

Førleikakrøv:
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Sjúkrarøktarfaklig víðariútbúgving frá hægri lærustovni er ein fyrimunur
- Víðariútbúgving og royndir innan leiðslu og fyrisiting
- Kunnleiki og innlit í fíggjarstýring
- Holl vitan um sjúkrarøktina frá fleiri økjum
- Framskygni viðvíkjandi røktarfakligu menningini
- Kunna taka avgerðir saman við hinum báðum í leiðsluni
- Skapandi evni og óbundin av vanahugsan, duga og tora at raðfesta uppgávur
- Góð samstarvsevni
- Góð samskiftisevni
- Góð leiðsluevni

Lønar- og setanarviðurskifti
Starvið verður áramálssett í 5 ár og verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, á stig 49, umframt áramálsviðbót, og ein ikki eftirlønargevandi viðbót, sum er kr. 5000 um mánaðin. Setanarøkið fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí. Arbeiðsstað verður Landssjúkrahúsið. Setanarmyndugleiki er Almanna- og heilsumálaráðið. Talan er um fulltíðarstarv.

Nærri fæst at vita um starvið, starvslýsing v.m. við at venda sær til Allan Skaalum, sjúkrahússtjóra, tel. 304500, lokal 1001 ella Poul Geert Hansen, aðalstjóra í Almanna- og heilsumálaráðnum tel. 304050.

Umsókn
Umsókn við avriti av prógvum, c.v., v.m. skal sendast til:
Almanna- og heilsumálaráðið,
Starvsfólkadeildin,
Eirargarður 2,
FO-100 Tórshavn.

Umsóknarfreist
Freistin at søkja er 7. apríl 2008, kl. 12.00.

KREA

**ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo